# Terji og Føstufressar aftur undan kavi

**Eitt av høvuðsnøvnunum á Ólavsøkukonsertini í ár verður Terji og Føstufressar. Hetta er fyrstu ferð síðan 1991, at bólkurin, sum stendur aftanfyri eina av mest seldu føroysku fløgunum, aftur stendur saman á palli**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Nú ólavsøkukonsertin, sum verður sunnudagin tann 27. juli, so spakuliga nærkast fæst greiða á, hvørjir bólkar fara standa á palli hetta kvøldið. Eitt av høvuðsnøvnunum á konsertini verður Terji og Føstufressar.

Føstufressarnir, ein av okkara allarbestu tónleikabólkum, verður nú aftur at hoyra á palli. Eftir at hava ligið í dvala í tólv ár, eru Terji og føstufressarnir vaknaðir aftur. Hetta er einki minni enn ein stórhending innan føroyskan tónleik, tí bólkurin stendur fyri eini av tí best umtóktu føroysku útgávunum nakrantíð.

Kaj Johannesen, ið er formaður í FUT, sum skipar fyri konsertini, váttar, Terja og Føstufressar skulu spæla, men hann leggur afturat, at enn eru allir smálutirnir ikki komnir uppá pláss. Hann væntar tó, at viðurskiftini skjótt eru fingin í rættlag.

### Fyrstu ferð síðan 1991

Terji og Føstufressar, sum var ein samanrenning millum nakrar av limunum í bólkinum Plúmm og øðrum tónleikarum, hava ikki verið á palli síðan 1991, tá bólkurin spældi eina konsert.

– Vit gleða okkum sjálvsagt sera nógv til at spæla saman aftur. Tað hevur í veruleikanum ongantíð ligið fyri hjá okkum at spæla saman, tí at bassspælarin hjá okkum Arnold Ludvig hevur búð uttanlands síðani 1991, og aðrir hava eisini verið nógv uttanlands, sigur Terji Rasmussen.

Sum skilst hevur Arnold ætlanir um at flyta heimaftur til Føroyar í næstum. Hann flutti í 1991 til Íslands, har hann var í tvey ár, og síðani hevur hann búleikast í Kanada. Leivur Thomsen og Eyðun Nolsøe búgva báðir í Danmark, men teir vera báðir í Føroyum í summar.

Bólkurin hevur givið eina fløgu út, sum hevur navn eftir bólkinum. Fløgan varð givin út í mars 1990. Hon er seld í umleið 5000 eintøkum, og er millum mest seldu fløgur í Føroyum. Terji og Føstufressar fara á konsertini at spæla sangir frá hesi legendarisku fløguni.

– Vit skulu bara uppfríska tónleikin, og fleiri av okkum hava eisini spælt sangirnar frá fløguni við øðrum bólkum gjøgnum árini. Tað verður eingin trupulleiki, tí at tónleikararnir í hesum bólkinum eru teir bestu í Føroyum, sigur Terji uttan at blunka.

### Fiasko at byrja við

– Tá fløgan kom út, var hon ein fiasko. Tað var ikki fyrr enn tvey ár seinni, at hon veruliga fór at selja, og nú er hon útseld, sigur Terji Rasmussen. Hann upplýsir, at hann enn rindar rentur uppá lánið, sum hann tók til at gera fløguna.

Av tí at fløgan seldi so seint, hevur tað tikið langa tíð at gjalda lánið aftur. Hevði hon selt 5000 eintøk beinanvegin, hevði tað verið lættari fíggjarliga.

– Hetta er tann fløgan, sum hevur havt størst týdning fyri meg, og sum eg havi verið mest nøgdur við, sigur Terji um fløguna, sum hann kallar sítt høvuðsverk.

### Gamla manningin

Hetta er fyrstu ferð í fleiri ár, at manningin aftur er savnað, men onkur, sum var við á fløguni, verður tó ikki við á konsertini.

Terji Rasmussen sigur, at Holger Laumann, sum spældi saxofon á fløguni, helst ikki verður við. Í hansara stað kemur onkur føroyskur saxofonspælari. Rúna á Heygum, ið sang ein sang á fløguni og sum harumframt sang kór til fleiri sangir, verður eftir øllum at døma heldur ikki við.

Annars verður manningin á konsertini eftir ætlan henda: Rógvi á Rógvu, trummur, Arnold Ludvig, bass, Magnus Johannesen, keyboard, Leivur Thomsen, el-gittar, Eyðun Nolsøe, akkustiskan gittar og Terji Rasmussen, sang.



*Terji Rasmussen hevur staðið nógv á palli millum ár og dag, men á ólavsøkukonsertini í ár verður tað saman við føstufressunum, og tað er ikki hent síðan 1991. Hetta er óivað góð tíðindi hjá tónleikaáhugaðum í Føroyum*

*Savnsmynd*

Fiskiveiðieftirlitið sóknast eftir maskinmeistarum:

# Freistin úti í gjár

**Hósdagin var freistin at søkja størvini sum maskinmeistari umborð Tjaldrinum og Brimli var úti. Stjórin á Fiskiveiðieftirlitinum metir, at umleið tjúgu umsóknir eru komnar inn**

STARVSETING
*Stefan í Skorini*

Seinastu dagarnar hevur Maskinmeisarafelagið havt lýsingar í Útvarpi Føroya, har felagið heitir á maskinmeistarar, sum søkja starv umborð á vaktarskipunum, um at venda sær til felagið.

Jógvan Nybo, formaður í Maskinmeistarafelagnum, sigur, at hetta er fyri at greiða umsøkjarunum frá støðuni hjá felagnum. Áður hevur felagið noktað limum sínum at søkja størvini, men nú verða umsøkjarar ella teir, sum ætla sær at søkja, ístaðin biðin um at venda sær til felagið.

Maskinmeistarafelagið stendur framvegis við sítt krav um, at allir teir maskinmeistararnir, sum søgdur seg úr starvi fyrr í ár, skulu hava størvini aftur. Hesum kravinum vil Fiskiveiðieftirlitið tó ikki ganga á møti.

– Hetta er talan setan av starvsfólki, og tað er ikki eitt fakfelagsmál, sigur Elmar Højgaard, stjóri á Fiskiveiðieftirlitinum.

Hann kundi ikki siga nágreiniliga, hvussu nógvar umsóknir eru komnar inn, men hann metir, at talan er um eini tjúgu umsóknir.

### Søkja umaftur

Sum Sosialurin skilir, hava allir teir maskinmeistararnir, sum fóru úr starvi tann 1. juni, søkt umaftur, men hetta hava vit ikki fingið váttað nakrastaðni.

Umsøkjararnir kunnu vænta at fáa svar einaferð í næstu viku, tá Fiskiveiðieftirlitið hevur viðgjørt umsóknirnar.

Elmar Højgaard torir ikki at siga, um Brimil leggur frá bryggju í næstu viku.

– Vit hava mannað vaktarskipini fyrr, men so hava menn setst aftur av ymsum orsøkum, sigur Elmar Højgaard. Atvoldin er sjálvsagt støðan hjá Maskinmeistarafelagnum til málið.



*Brimil hevur ligið við bryggju síðan 1. juni, og Tjaldrið fer á beding í næstu viku. Freistin at søkja størvini sum maskinmeistari umborða á vaktarskipunum var úti hósdagin*

*Savnsmynd*



# Rósur frá donskum ummælara

**Prix Føroyar fær góð skoðsmál frá donskum ummælara á blaðnum Musikeren. Ummælarin, Morten Steen Nielsen, væntar millum annað, at Brandur Enni uttan iva fer at vera meira at hoyra til, og harafturat kallar hann Petur Pólsson fyri eitt fjallatrøll**

PRIX FØROYAR
*Ingrid Bjarnastein*

Danska blaðið »Musikeren« gevur Prix Føroyum góð ummæli. Ummælarin, Morten Steen Nielsen, heldur, at ungu føroysku tónleikararnir verða tiknir álvarsamt, bæði av foreldrum, politikkarum, tónleikalærarum og eldri tónleikarum. Og er ummælarin eisini bilsin av tí góða stuðlinum, sum føroyskir tónleikarar fáa.

Fríggjakvøldið áðrenn sjálva Prix Føroyar finaluna varð hildin ein pallborðsfundur í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Við á fundinum vóru umboð fyri plátufeløg, og harafturat vóru føroyskar framførslur eisini á skránni. Har ímillum var 14 ára gamli Brandur Enni, sum ummælarin hjá Musikeren eisini hevur bitið merki í.

»Serliga tann 14 ára gamli Brandur vakti ans við sínum íoyrafallandi og ógvuliga popputa tónleiki við eini góðari pallframførslu. Hann koma vit uttan iva, at hoyra meira til.«, skrivar Morten Steen Nielsen.

### Fjallatrøllið Petur

Danski ummælarin dylir ikki fyri, at hann heldur, at Clickhaze uttan kapping eru nógv tann mest framkomni bólkurin innan føroyska tónleikaheimin.

»Clickhaze vísti, at tey framvegis eru avgjørdu meistararnir við tí karismatisku og berføttu Eivør Pálsdóttir og tí lítla rappandi fjallatrøllinum Petur Jensen, sum frontfigurar...«, skrivar danski ummælarin, sum leggur afturat, at Clickhaze hevði eitt nógv breiðari úrval enn nakar av teimum bólkunum, sum var til staðar í Norðurlandahúsinum til Prix Føroyar finaluna.

Ummælarin sigur millum annað, at hugflogið hjá teimum ymsu bólkunum spenti seg vítt. Og við stjørnukastarum og egnum fjepparaklubba hjá Gestum megnaðu teir at vinna kappingina.

Morten Steen Nielsen setur spurningin, hví tónleikur trívist so væl í Føroyum. Og hann heldur, at Prix Føroyar er eitt upplagt høvi fyri Danmark og útlandið at fáa eyguni upp fyri teimum føroysku tónleika dygdunum.

»Prixið gevur teimum ungu føroysku tónleikarunum eitt mál at arbeiða ímóti, tá teir sláa á streingirnar í venjingarhølunum; eitt mál, sum gevur teimum ein veruligan møguleika, at koma út í tónleikaheimin, sjálvt um oyggjarnar liggja so avsíðis«, skrivar danski ummælarin at enda.



*Danski ummælarin, Morten Steen Nielsen heldur, at Prix Føroyar er eitt upplagt høvi hjá føroyskum tónleikarum at koma út í altjóða tónleikaheimin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Nordvesten í Klaksvík og Fuglafirði

**Fuglafjørður og Klaksvík eru vertir fyri Nordvesten stevnuni, sum verður 02.-06. juli. Feløg og einstaklingar úr Noregi og Íslandi verða boðin við á mentunarstevnuna, har hópin av fólki úr føroyska mentunarheiminum eisini eru við**

NORDVESTEN 2003
*Solby A. Eliasen*

Hópin av spennandi tiltøkum verða á skránni á Nordvesten í ár. Ætlanin við tiltakinum er við breiðum mentanartilboðum at varpa norðurlendskt ljós á møguliga felags eyðkenni og uppruna. Fólkadansur, konsertir, listaframsýningar, framsýningar um post og økissøvn, fyrilestrar, útferðir, virkisvitjanir og málting er brot úr rúgvuni av tilboðum, sum verða í Klaksvík og Fuglafirði í summar. Eisini verður skipað fyri gongu- og útróðrartúrum.

Úr Nordøsterdalen í Noregi koma fólkadansara, fólkatónleikarabólkur, hornorkestur, ungdómssjónleikarabólkur og listamálari. Somuleiðis verður tann so kendi jazz-bólkurin, Dixi, við á Nordvesten. Dixi var her í Føroyum í sambandi við Musikkstevuna í Runavík, har teir bergtóku allan áhoyraraskaran og allar luttakarar við teirra framúrskarandi framførslu.

Úr Íslandi kemur eitt manskór, sum eitur Fóstbræður. Tað eru umleið 60 sangarar í kórinum, men onnur 40 verða við í teirra ferðalagi. Tvær listakvinnur koma eisini, Rósa Sigrún Jónsdóttir og Margrét Birgisdóttir fara at hava framsýning í Klaksvík. Nakrir víkingar frá Fjørukránni verða við og fara millum annað at sýna fram glíming.

### Málting

Høvuðsyvirskriftin fyri Nordvesten hesuferð er: Hvussu varðveita vit norðurlendsku málini? Hetta evnið verður viðgjørt á einum sokallaðum máltingi, har fleiri fyrilestrar verða á skránni. Úr Noregi koma Albert Einarsson og Endre Brunstad at halda fyrilestur um "Det nordiske sprog". Umboðið fyri Ísland til máltingið verður Kristján Árnason, professari og úr Føroyum verða millum onnur Jóhan Hendrik Winther Poulsen, Jógvan í Lon Jacobsen og Rúni Hansen.

Hetta máltingið verður ein almennur fundur, sum verður í auluni á studentaskúlanum á Kambsdali hósdagin 3.juli. Fyrireikararnir vóna somuleiðis, at eitt gott og lívligt kjak kann koma burturúr, har spurnartekin verður sett við, hvussu tillaga vit málið, og hvussu varðveita vit málið.

Av tí at stevnan er í Føroyum, so eru tað sum vera man føroyingar, sum seta sín størsta dám á. Føroyski dansurin og norski fólkadansurin eru ein týðandi partur av tiltakinum. Eini 120 dansarar úr Klaksvík og Eysturoynni verða partur av stevnuni.

Somuleiðis verður føroysk list á skránni. Ein vælumboðandi skari av listarfólkum sýna tí fram í Klaksvík og Fuglafirði saman við sínum norsku og íslendsku starvsfeløgum. Millum onnur kunnu nevnast: Frits Johannesen, Øssur Mohr, Heðin Kambsdal, Archibald Black, Edward Fuglø, Høgni Thomsen og fleiri.

Postverkið luttekur við eini frímerkjaframsýning, har tað eisini eru uppsettar myndir frá gomlum døgum, sum lýsa tær torføru farleiðirnar um fjøll og firðir - og av somu grund drúgvu postgongd – við smáum bátum millum oyggjarnar og strævna gongd um høg fjøll.

Vágsheygafrensarnir eru ein tónleikabólkur, sum er sprottin úr Klaksvíkar Hornorkestri. Teir spæla kendan og góðan dansitónleik og verða við til fleiri konsertir, dans og onnur útitiltøk. Somuleiðis fara hornorkestrini bæði í býunum eisini at luttaka til fleiri tiltøk.

Eisini verður nógvur kórsangur á stevnuni.

Alt í alt kann bara staðfestast, at Nordvesten 2003 í Klaksvík og Fuglafirði ljóðar til at fara at verða ein serstakliga áhugaverd og fjølbroytt mentunarstevna, har norðurlendska málið verður sett í hásæti.

Stevnan verður løgd tilrættis í Klaksvík og Fuglafirði av einum 5 manna bólki, har Dávur Winther og Petur Martin Petersen eru samskiparar fyri hvønn býin sær. Størri avgerðir verða tiknar í samráð við avvarandi býráð, sum hevur sett pening av til tiltakið. Eisini hevur Norðurlandaráðið stuðlað tiltakinum.

Nordvesten er vanliga annahvørt ár, og stevnan var á fyrsta sinni hildin í Nordøsterdalen í mið-Noregi í 1991.




*Mentunarstevnan Nordvesten verður í Klaksvík og Fuglafirði 2. og 6. juli, har hon enn einaferð bjóðar upp á eina sera fjølbroytta mentunarliga skrá. Seinast Nordvesten var í Føroyum var í 1997*